**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 ungdómsmøti við Jákup Eli Østerø.
Sunnudagin kl. 18 møti við Róa Norðoy. Evni: Trúgv, vón & kærleiki. Barnamøti er samstundis.
Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**KFUM & K, Klaksvík**
Fríggjakvøld, 25. jan. kl .22 - Opið Hús.
Sunnudagin 27. jan. kl. 14 - Sunnudagsskúli,
kl. 18 - Møti v/ Øssur Kjølbro
kl. 21 - Ungdómsmøti v/ Kristinu Larsen.

**Soli Deo Gloria!**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Bodil Jónfríðu og Marionnu.

**Hvannasund - Skúlin**
Sunnukvøldið kl 18 verður møti. Jóhan Henriksen talar.

**Vetrarstevnan á Sandoynni 2008**
Vetrarstevnan verður hildin í Skopun í døgunum 23. til 27. januar 2008.
Fríggjakvøldið kl. 19 Møti í Samljóð, Eivind Frøen úr Noregi talar, Hanna og Terji úr Kollafirði syngja.
Leygarkvøldið kl. 19 Møti í Samljóð, Eivind Frøen úr Noregi talar, Ecclesia úr Klaksvík syngja.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli í Missiónshúsinum, allar familjur vælkomnar. Kl. 18 Møti í Samljóð, Eivind Frøen úr Noregi talar, Oasubrøðurnir úr Havn syngja.
Bøn og lovsangur 1/2 tíma undan hvørjum møti.
Aftaná møtini í Samljóð verður drekkamunnur.
Eftirmøti, við sangi og fríum vitnisburði verður í Samljóð.
Innsavnan verður á møtinum í Samljóð.
Øll eru hjartaliga vælkomin til vetrarstevnu í Skopun.
Teistin siglir hvørt kvøld úr Skopun kl. 22.30.
***Hebr. 13,8 Jesus Kristus er í gjár og í dag hin sami og um allar ævir.***

**Missiónshúsið, Tvøroyri**
Eingin sunnudagsskúli verður vegna familliugudstænastu, sum verður kl. 11, tann 27.1. Einki møti verður vegna missiónsviku í Hovi.

**Roynhøllin/ Hvalba**
25. jan fríggjadagin kl. 17 Barnamøti,
kl. 20 evang møti.
Svenning av Lofti talar - Suðuroyarkórið syngur
kl. 22 Ungdómsløta: Páll á Lakjuni talar
Leygardag kl. 17 Barnamøti
Kl. 20 evangelisk møti : Svenning av Lofti talar - Finnbjørn & Svein o.fl syngja
kl. 22 Ungdómsløta: Svein Petersen talar
Sunnudagur kl. 15 Barnamøti
kl. 18 Evangelisk møti: Svenning av Lofti talar- Randi Nolsøe syngur.

**Missiónshúsið í Hovi**
Leygardag kl. 20.00 og sunnudag kl. 18.00
Møti við Sylverius Jacobsen, Tórfinn Hansen Skála og Henry Jarnskorð Strendur. Sunnudagin syngur streingjakórið í Porkeri.

**Samkoman Vitnið**
Ungdómsmøti verður í roynhøllini í Hvalba, fríggjakvøldið 25. januar og leygarkvøldið 26. januar kl. 22.
Øll eru vælkomin.

**Frelsunarherurin, Vágur**
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti og sunnudagsskúli, kl. 18 Møti v/Streingjakórinun.

**Missiónshúsið, Vágur**
Møti verður sunnudagin kl. 18 við John Myllhamar, trúboðara.
Bønarmøti verður týskvøldið kl. 20. Øll eru vælkomin.

**Stovna Føroya Felag í Stóra Bretlandi**
Stig eru tikin til at stovna Foroya Felag í Stóra Bretlandi. Stovnandi aðalfundur verður i hølunum hja donsku kirkjuni i London 2. februar 2008 kl. 16. Adressan hja donsku kirkjuni er: 4 St. Katherine's Precinct, Regent's Park, London NW1 4HH. Eftir aðalfundin verður buffet @ 12£. Vinarliga boða fra luttøku áðrenn 25. januar til: ottar@foroyar.org.uk

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur 28. jan.***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
11.00 - 11.45 Enskt talumál
14.00 - 17.00 Kortspæl o.o. spøl
16.00 – 18.00 Nú verður høvi at læra seg at spæla kortspælið: Stýrivolt Undirvísari, Jógvan Bærentsen
***Týsdagur 29. jan.***
09.00 - 10.30 At keypa á netinum (lítið royndir brúkarar) P.Poulsen
10.30 – 12.00 At keypa á netinum (royndir brúkarar ) Páll Poulsen
10.00 – 11.30 Vit syngja Árni Hansen.
Vitjan frá Háskúlanum
Øll eru hjartaliga vælkomin
Málprát - Jóhann H. W. Poulsen
Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagur 30. jan.***
09.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grethu Harlou
12.00 Døgurði
15.00 Túrur: Undir Gráastein, við bussi úr Steinatúni kl. 15.00
Randi/Elisabeth, fysioperapeutar
***Hósdagur 31. jan.***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin: Vit lesa: Ljósini slókna Elin Mortensen
Hittast hósdagin 7.feb. í dag
14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
***Fríggjadagur 1. februar***
10.00 - 13.30 Matgerð v/ Annu Grerhu Harlou
12.00 Døgurði
13.30 – 17.00 Opið hús
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00.
Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795.
Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18.
Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
Opið hvønn gerandisdag frá kl. 15-18. Um tygum mangla bil, vinarliga ring 266217.
Allir pensionistar eru hjartaliga vælkomnir.
***Mánadagur 28. januar***
Fimleikur - felagssangur
***Týsdagur 29. januar***
Telduhugni v/ Jens Dalsgaard.
***Mikudagur 30. januar***
Opið hús.
***Hósdagur 31. januar***
Myndaveving v/ Gretu Olsen
***Fríggjadagur 1. februar***
Boccia.
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Tú ert vælkomin at hava títt egna hondarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17.
Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 28. jan.***
Vit lurta eftir 3. broti av »Mors og fars historie«.
***Mikudagin 30. jan.***
Upplestur við Finnbjørn Dam.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag kl. 09.30 – 17.30
*Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks.*
*Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a.*
***Hvør dagur endar við andakt og sangi.***
***Øll eru hjartaliga vælkomin.***

**Vága Pensionistafelag**
Vit skipa fyri tiltøkum nakrar ferðir um árið. Kundi tú hugsað tær at vita meira um felagið ella at gerast limur, kanst tú venda tær til, formannin: Frits Jacobsen, tlf. 332053 ella ein av nevndarlimunum.

**Eldrahugni á Tvøroyri**
Er á kafeteria í høllini í Trongisvági hvønn onsdag í *líkaviku* frá kl 15.00 til 18.00. Bilur fæst til staðið við at ringja 371069 eftir kl. 13.

**Dagtilhaldið í Vági**
er hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15 til 18. Øll eru vælkomin.

**Heilafelagið, felagið fyri apopleksi- og afasirakt**
Tlf. 321520 · t-postur: heilaf@post.olivant.fo

**Kunningarstovan, Felagið Tórshavn**
Vaglið 4, Postboks 379, 110 Tórshavn.
tlf. 302425
torsinfo@torshavn.foa
www.visittorshavn.fo
Opið er má-fr kl. 11-17, ley kl. 10-13.

**Sandoyar Kunningarstova**
210 Sandur
www.visitsandoy.fo
tlf. 361836
Skrivstovan er opin mánadag til fríggjadag kl. 13-16.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórsh.
tlf. 319630/61 655400.

**Rúslinjan hjá Bláa Krossi**
Rúslinjan hjá Bláa Krossi, tlf. 318586, svarar fríggja-, leygar- og sunnukvøld kl. 20 - 24.

**Opin ACA-fundur Tinghúsvegur 37, Havn**
(Tilkomin hjá alkoholikarum og vantrivnaður, dysfunktionellum, familjum). Leygardag kl. 11.00-12.00 á Tinghúsvegi 37 í Havn.

**AA-fundir í Havn**
**Tinghúsvegur 37**
Mánadag: kl. 20.00–21.00
Hósdag: kl. 20.00–21.00
Fríggjadag: kl. 20.00–21.00 og kl. 22.30–23.30
Leygardag: Opin fundur kl. 09-10, kl. 17.00–18.00.
Leygardag: kl. 22.30-23.30 AA-fundur.
Sunnudag: kl. 11.00–12.00.
Heimasíða: http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**AA-fundir - (Big book meeting)**
Týsdag: kl. 20.00 Stóri bókafundur er hvørt týskvøld í Losjuni á Tinghúsvegi 18. Inngongd frá Bøkjarabrekku.

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt hóskvøld kl. 20 og týskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tinghúsvegur 37.

**AA-fundir í Vestmanna**
Í Skótahúsunum
Hósdag kl. 20 AA-fundur.
Sunnudag kl. 17 AA-fundur (opin fundur).

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**Al-Anon**
fundur fyri avvarðandi at alkaholikkara er hvørt týskvøld kl. 21, á Mýruvegi 22.

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld kl. 19.00 og sunnudag kl. 16.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

# Brúðarmyndir



*Hjartaliga tøkk til øll tykkum, ið gjørdu okkara brúnabandsdag 27-1-07 ógloymandi.*
*Gott nýggjár!*
***Noomi og Jákup Martin***

**Føðingardagar!**
Tann 30. januar og 7. februar verða Elsebeth og Knút Nielsen í Vági 60 og 65 ár. Dagarnir verða hildnir í skótahúsinum tann 2. februar frá kl. 19.00. Øll eru hjartarliga vælkomin.

**60 ár**
Mánadagin 28. januar fyllir Jógvan Vágsheyg í Klaksvík 60 ár. Dagurin verður hildin leygardagin fyri innbodnum.

15. februar verður Óli Emil Olsen, Vágur 60 ár. Dagurin verður hildin í Framtíðini leygardagin 16. februar frá kl. 19. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við Óla Emil verða biðin um at siga frá áðrenn 8. februar á tlf. 266660.

**70 ár**
Mikudagin 30. januar verður Egil Simonsen, Hoyvík 70 ár. Dagurin verður hildin heima, Garðarvegur 7 í Hoyvík sama dag frá kl. 18.00. Øll eru vælkomin.

**Brúdleyp**
Leygardagin 2. februar kl.13.00 giftast í Prestagarðinum í Miðvági, Rigmor í Lon, Miðvágur og Hans Petur Tjørnudal, Signabøur. Døgurði verður fyri innbodnum á Hotel Vágum. Vælkomst til kaffi verður í Filadelfia Vágar í Miðvági kl. 20.00 Øll eru hjartaliga vælkomin:):)

2. februar giftast í Thyregod kirkju Ann Christin Johannesen, Tvøroyri og Ingálvur Nordendal, Toftir. Adr.: Ågårdsvej 61, 7323 Thyregod DK.



15. mars kl. 15 giftast vit bæði, Hanni Højgaard & Fríðhild Kristina Hansen í Glyvra kirkju. Eftir hetta hava vit døgurða í Mentanarhúsinum í Fuglafirði kl. 18, har øll eru hjartaliga vælkomin, við at tekna seg á 447805 ella 447511, innan 1. mars. Tað hevði glett okkum, um tit vildu hildið henda dagin saman við okkum.

***Hey vit skulu giftast!***



Leygardagin 15. mars kl.15 giftast, í sali Frelsunarhersins, Henrietta Joensen úr Tórshavn og Sámal Midjord úr Vági. Veitslan verður í HB-húsinum kl. 19.
Tað hevði glett okkum um tú/tit, høvdu vilja hildið dagin saman við okkum. Ring á tlf. 319072 / 264854 (Sámal) ella 263816 (Henrietta) í seinasta lagi 23. februar.

**Silvurbrúdleyp**
Mánadagin 28/1 kunnu hjúnini Lea og Óli Wolles í Søldarfirði halda silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 9/2. Tey, ið ynskja at gleða okkum við eini vitjan eru vælkomin í høllina á Eiði leygardagin 9. februar millum kl. 15. og 21. Fyri at hava eina hóming av, hvussu mong eru væntandi, hevði verið gott at fingið boð í seinasta lagi mikudagin 6. februar á tlf. 44 20 31 ella teldupost oliwo@kallnet.fo